# Eldur í húsum í Vestmanna

POLITITÍÐINDI
*Marjun Dalsgaard*

Sunnumorgum klokkan 07.20 var boðað frá eldi í einum sethúsum á Heygum í Vestmanna. Eldurin sást ongantíð uttan, og eingin vandi var fyri grannahúsunum. Tó var talan um minuttir, áðrenn støðan kundi verið sera hættislig, metir sýslumaðurin í Vestmanna, Ivan Klein Olsen.

Ein kvinna var inni, tá eldur kom í. Hon var ikki í lívsvanda, men er sera skelkað.

– Eg vaknaði við ein brest og fór út, greiðir hon frá. Her hitti hon nakrar ungar menn, ið vóru á veg heim frá Varmakeldu, tá teir sóu, at roykur stóð úr tekjuni á húsunum, og teir boðaðu síðan frá eldinum.

Tað gekk skjótt at sløkkja eldin, og 50 minuttir eftir var hann bastur. Av tí at eldurin var hildin at vera ógvusligari, enn hann var, komu bæði sløkkiliðini úr Vestmanna og Kvívík á staðið, greiður Ivan Klein Olsen frá. Hann heldur orsøkina til eldin vera ein kortslutning, av tí at eldurin er komin í tætt við eina kommodu við ljósi í, sum stóð í gongini. Gongin er sera illa brend, og stórur roykskaði er staðin av eldinum.

# Gamlar el-innleggingar eru vandamiklar

TRYGD
*Marjun Dalsgaard*

Nógvir skaðar standast hvørt ár av el-innleggingum frá 50'unum og 60'unum. Ofta er talan um smærri skaðar, men tað kann vera sera vandamikið, um húsini er gjørd av sonevndum bleytum plátum, sum vóru nógv nýttar til sethús í 50'unum – og teimum eru tað nógv av, sigur Emil Simonsen, leiðari hjá sýnsmonnunum hjá Tryggingarfelanum Føroyar.

– Trupuleikin við gomlum el-innlegginum er, at leidningarnir eru lagdir beinleiðis inn í veggin. Hendur ein kortslutningur, er beinleiðis samband við veggin, og tað kann føra til umfatandi eldsbruna – serliga um húsini eru bygd av sonevndum gassplátum. Tá breiður eldurin seg so skjótt, at húsini kunnu brenna í grund upp á onga tíð, sigur hann.

At sløkkja kontaktina ella taka stikkið úr kontaktini, er eingin trygd í hesum føri. Tað einasta rætta er at skifta gamlar el-innleggingar út, heldur Emil Simonsen. Í dag verða allir leidningarnir samlaðir í einum kassa aftan fyri veggin, so teir ikki koma í samband við pláturnar, um ein leidningur brennur saman.



*Gamlar el-innleggingar frá 50'unum og 60'unum kunnu vera lívshættisligar og eiga at skiftast út, sigur Emil Simonsen, leiðari hjá sýnsmonnunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar*








# Roknskapir í andgletti

MARKNAÐARRÁK

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,46% | 0,01% |
| 5 ára lánsbræv | 3,24% | 0,08% |
| 10 ára lánsbræv | 4,12% | 0,12% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 216,3 | 0,7% |
| OMX, Svøriki | 546,7 | 2,9% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2 433,1 | 1,6% |
| S&P 500, USA | 985,7 | 1,1% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,26 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 166,47 | -0,5% |
| Norron Partabrøv | 63,53 | 1,2% |
| Altjóða Partabrøv | 69,94 | 1,0% |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 650,73 | 0,8% |
| EUR | 743,37 | 0,1% |
| GBP | 1 080,62 | 1,2% |
| NOK | 89,60 | 0,0% |

Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.

Fyri viku síðani varð mett, at størst sannlíkindi var fyri, at renturnar í farnu viku fóru at hækka - soleiðis bleiv tað eisini. Orsøkin var ein staðfesting av, at tekin eru um, at tað sum heild gongur betur í amerikanska búskapinum. Kortini var eisini staðfest, at enn gongur striltið á amerikanska arbeiðsmarknaðinum. Menningin av arbeiðsmarknaðinum er oftani seinkað í mun til gongdina í vinnuni, so vón er um, at arbeiðsmarknaðurin fer at koma seg. Kortini gevur hetta ábendingar um, at leiðin fram ímóti betri búskaparligum viðurskiftum, kann gerast skinklut. Tað er tó ein sannroynd, at virðisbrævamarknaðirnir taka eina væntaða gongd til sín, áðrenn hendan endaliga er staðfest - tískil eru renturnar hækkaðar seinastu vikurnar.

Farna vika gjørdist ein góð partabrævavika. Orsøkin til hetta var tann sama, sum førdi við sær hækkandi lánsbrævarentur. Tøl í farnu viku vístu, at bæði amerikanska framleiðslu- og tænastuvinnan eru bjørtskygd, og hetta bjartskygni trýsti partabrævakursirnar uppeftir.

Hesa vikuna verður tunnligt við búskarligum lyklatølum. Kortini verður vikan áhugaverd. Hósdagin hevur evropiski miðbankin (ECB) rentufund. Næstseinastu viku lækkaði amerikanski tjóðbankin leiðandi rentu teirra og vóru positivari um búskapargongdina. Síðani tá hevur formaðurin í ECB eisini sagt, at evropiska rentan er hóskandi, og at hon ikki forðar fyri búskaparligari framgongd. Vit meta tí ikki, at ECB fer at lækka evropisku rentuna hósdagin.

Størsta týdning fyri bæði partabræva- og lánsbrævamarknaðirnar hesa vikuna fara almannkunngerðir av roknskapum fyri næsta ársfjórðing at hava. Kunngerðirnar byrja av álvara hesa vikuna tá m.a. General Electrics, Pepsi og Yahoo, øll úr USA, kunngerða roknskap.

Tá kunngerðirnar fyri fyrsta ársfjórðing vóru av, var samlaða úrslitið hampuligt, og flestu virkini høvdu lagt fram góðar roknskapir samstundis sum tey høvdu góðar vónir um næsta ársfjórðing. Fyri amerikansk virkir var ein orsøk til hetta fallið í dollaranum, ið betrar um kappingarførið. Í øðrum ársfjórðingi hevur dollarin verið enn lægri, og tí er sannlíkindi fyri, at amerikansk virkir staðfesta hesar vónir. Orsakað av árinum úr USA, kann tískil roknast við, at partabrævamarknaðirnir næstu vikurnar fara at standa seg hampuligt, meðan lánsbrævarenturnar orsakað av hesum kunnu hækka meira.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hans Arne Nielsen 70 ár



29. juni fylti Hans Arne Nielsen í Sandavági 70 ár. Hans Arne er føddur og uppvaksin í Sandavági, sonur Jóhannu, f. Simonsen, og Thor Nielsen, skippara, bæði úr Sandavági. Sum 15 ára gamal fór hann í læru sum elektrikari hjá Sigird av Reyni í Havn. Eftir at hava lært í hálvtannað ár hjá Sigird, lærdi hann seg lidnan hjá systkinabarninum Christian Nilsen maskinmeistara í Sandavági. Í september 1952 fór hann til Danmarkar at taka sveinaroyndina og tók prógv sum el-innleggjarai 6. juni 1953.

Eftir tað kom Hans Arne heim aftur til Føroyar og fór at arbeiða hjá Christian Nielsen í Sandavági sum el-innleggjari. Har arbeiddi hann til 1956, tá hann yvirtók virkið hjá Christiani Nielsen. Síðan tá hevur hann arbeitt sum sjálvstøðugur vinnurekandi. Í 1961 giftist Hans Arne við Sunrid, f. Jacobsen, dóttir Solveig og Alfred Jacobsen, úr Sandavági. Bæði Sunrid og Hans Arne hava verið ítróttarfólk, tey hava t.d spælt hondbólt og róð kapp við Sandavágsbátinum. Tey eiga fimm børn, tey eru: Sonni, Torkil, Allan, Solveig og Jóhan. Øll børnini búgva í Sandavági uttan dóttirin, Solveig, sum býr í Sørvági.

## Dagurin

**8. juli. Ketil biskupur.** Hesin biskupurin í Würtenburg í Týsklandi var ættaður úr Skotlandi. Sankta Kilian, sum hann varð róptur, varð saman við feløgum sínum Totnan og Kolonat tikin av døgum í árinum 689. Hann hevði umvent hertogan har á staðnum og yvirtalað hann til at lata seg skilja frá konuni, ið áður hevði verið gift við bróður hansara. Í øði læt konan hann og felagar hansara taka av døgum. Kilian varð seinni skírdur halgimenni, og eftirmaður hansara sum biskupur í Würtenburg læt likam hansara leggja í halgiskrín 8. juli 752.

Í Norðurlondum fekk hann navnið **Ketil**, ið eisini hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum. Nú á døgum man tað vera best kent av skaldsøguni *Feðgar á ferð* eftir Heðin Brú. Er eisini komin í bland við danska halgimenni St. Kjeld.

Ein Ketilsheyggur er í Skálavík. Fleiristaðni í Føroyum vita tey at siga eitt ørindi, sum skal vera lisið sum lyklaorð til at finna ein ketil, ið er niðurgrivin við pengum – gulli og silvuri. So seint sum fyrst í 20. øld er drongur doyptur og skrivaður í kirkjubókina, har eitt fornavn er Kedelhoy. Navnið merkir *hattur* ella *hjálmur*.

# Summarlegurnar á Zarepta byrjaðar

**37. árið á rað eru summarlegur á Zarepta á Vatnsoyrum. Nógv børn og ung koma til hesar legur, sum hava verið har síðan 1967. Áðrenn tað vóru í tvey ár legur í ALV-húsinum við Áir**

SUMMARLEGUR
*Magnus Gunnarsson*

Leguhúsið hjá brøðrasamkomunum í Føroyum, Zarepta á Vatnsoyrum, verður brúkt so gott sum alt árið. Almenna skáin byrjaði 15. mai við leguni fyri brekað, síðan hava fleiri legur verið, sum t.d fýra familjulegur sum vóru frá 1. til 27. juni. Summarlegurnar byrjaðu sunnudagin 29. juni og halda fram til 15. august. Eftir summarfrítíðina verða eisini ymiskar legur, sum t.d. mans- og kvinnustevnur, hjúnastevnur og heystlega í heystfrítíðini. Um veturin verður húsið mest brúkt til vikuskiftislegur hjá teimum ymisku samkomunum.

Børnini spæla og venja likamið, og skipaðir fótbóltsdystir eru millum tey ymisku liðini. Aðrir aktivitetir eru eisini, sum t.d. at rógva við bátum og sigla við súkklubátum á Leitisvatni, rógva við kano í ánni og svimja í innandura svimjihylinum. Børnini og tey ungu læra at fremja gott samanhald millum luttakararnar á legunum. Eisini læra tey at vera ásettum reglum lýðin, at fremja vanliga heilsurøkt, at hava siðiliga atferð og verja og virða náttúruna eins og mentanarvirðini. Umframt at tey ungu hugna sær saman og hava tað stuttligt, er endamálið við legunum at vinna børn og ung fyri Kristus.



# Bilasølan minkar framvegis

**Nýggjastu tølini frá Bileftirlitinum vísa, at bilasølan í landinum framvegis er minkandi. Samlaða sølan av nýggjum persónbilum fyrra hálvár 2003 er næstan hálvtannaðhundrað bilar færri enn sama tíðarskeið í fjør**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*



Samlaða sølan av nýggjum akførum í Føroyum fyrra hálvár 2003 er uml.15 prosent minni en sama tíðarskeið í fjør. Sølan av persónbilum er minkað við uml. 17 prosentum og útskiftingin av hýruvognum er eisini minkað, í ár eru seldir níggju hýruvognar ímóti sekstan í fjør. Seinasta mánað hildu vit, at ein orsøk til minkandi søluna kundi vera verkfallið, ið vardi umleið ein mánað, men nú skuldi tað verið komið upp á pláss. Bilhandlarar vit hava tosað við siga, at talan er um eina náttúrliga minking, av tí at marknaðurin er við at vera mettaður og útskiftingin ikki so stór sum áður. Sølan av motorsúkklum er tvífaldað, átta motorsúkklur eru seldar í ár móti fýra í fjør.

**Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-JUN í 2003 og 2002.**

| Akfaraslag | Jun 2003 | Jun 2002 | Broyting Jun 03/02 | Jan-Jun 2003 | Jan-Jun 2002 | broyting 2003/2002 | %broyting 2003/2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 1 | -1 | 1 | 1 | 0 | 0,00% |
| Bussar | 0 | 5 | -5 | 3 | 9 | -6 | -66,67% |
| Kampingvognur | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | |
| Hýrubilar | 1 | 6 | -5 | 9 | 16 | -7 | -43,75% |
| Lastbilar | 8 | 2 | 6 | 9 | 12 | -3 | -25,00% |
| Leguvognar | 1 | 0 | 1 | 5 | 3 | 2 | 66,67% |
| Motorsúkkla | 3 | 0 | 3 | 8 | 4 | 4 | 100,00% |
| Neyðsendakfar | 1 | 1 | 0 | 2 | 3 | -1 | -33,33% |
| Persónbilar | 161 | 168 | -7 | 704 | 851 | -147 | -17,27% |
| Smábussar | 2 | 0 | 2 | 5 | 1 | 4 | 400,00% |
| Tangabilar | 1 | 0 | 1 | 4 | 0 | 4 | |
| Viðfestivognar | 18 | 14 | 4 | 53 | 60 | -7 | -11,67% |
| Vøruvognar | 24 | 30 | -6 | 143 | 160 | -17 | -10,63% |
| **Samlað** | 221 | 227 | -6 | 947 | 1120 | -173 | -15,45% |

Í juni 2003 eru skrásett 13 nýggj prutl og higartil í ár eru skrásett 88 nýggj prutl.

*Bileftirlit Føroya*